

# Torradagar
## í Klaksvík

## 23. – 28. feb. 2009

### Bakaríið hjá Jórun
**23. – 28. feb. 2009 · Kl. 11.30 – 13.30**
Hjá Jórun verður annarleiðis og spennandi matskrá hvønn dag alla torravikuna.
Tú kanst velja millum fiska- og kjøtrættir.
Eisini verður ein heilt serlig fiska- og kjøtbuffét leygardagin 28. feb. 2009.
*- Sí matskránna í blaðnum*
*http://www.jorun.fo*



### Fiskimið í Norðoyggjum.
**Norðoya Fornminnasavn**
**týsdagin 24. til fríggjadagin**
**27. feb. kl. 17.00 - 19.00**

Sýnir fram partar av søguligum tilfari um fiskimið í Norðoyggjum.
Hvat er savnað og útgivið, og eisini verða útróðrarleiðirnar vístar á korti.
Framsýningin er opin frá týsdegnum 24. til fríggjadagin 27. februar kl. 17.00 - 19.00

### Á flot við teldu
**Á Klaksvíkar Bókasavni**
**týsdagin 24. feb. 2009 kl. 19.30**

*Knud Simonsen, havfrøðingur, náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetur Føroya.*

Streymkort frá teldusimuleringum, fiskimiðasøvn og bátakunnleiki eru savnað í eina telduskipan, sum er ætlað at verða hent kunning hjá teimum, ið dáma at fara á flot av og á. Men eisini útróðrarmenn hava sýnt skipanini áhuga.
Grundarlagið undir skipanini er frá áralongum virksemi á Fróðskaparsetrinum og á Fiskirannsóknarstovuni, sum er runnið saman við stóra bátaáhuganum hjá nøkrum einstaklingum og virkjum. Í framløguni verður greitt frá grundarlagnum undir nýggju HÚK-skipanini, og hvussu hon virkar.

### Virðisøkt veiða og vinningur
**Á Klaksvíkar Bókasavni**
**mikudagin 25. feb. 2009 kl. 19.30**

*dr. Hóraldur Joensen, granskingarleiðari á Fróðskaparsetur Føroya*

Føroyar eru í stóran mun rávøruframleiðari. Lítið og einki verður gjørt fyri at virðisøkja føðitilfeingið, sum fæst úr havinum. Á henda hátt er Føroyaland líkt einum u-landi. Fleiri ymiskar vitanartungar fyritøkur, sum framleiða marinar hávirðisúrdráttir, kundu verðið settar á stovn, høvdu vit eitt vælvirkandi universitet við miðvísari matvørugransking.

### Grind sum mannaføði?
**Á Klaksvíkar Bókasavni**
**hósdagin 26. feb. 2009 kl. 19.30**

*Pál Weihe, yvirlækni á deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu*

Nøgdin av dálkingarevnum í føroyingum er stór í alheimshøpi. Seinastu kanningarnar sýna tó, at kvinnur, ið eru við barn eta munandi minni av grind og spiki, enn áður. Av hesum er kyksilvurmongdin í blóðinum hjá barnakonum minkað.
Men mongdin av PCB er óbroytt, helst av tí at PCB verður brotið niður so spakuliga. Vit í Føroyum eiga bert lítlan lut í teirri dálking, sum er farin fram av høvunum, men hon er komin á okkum uttanifrá. Við teimum seinastu granskingarúrslitunum í huga, mæla landslæknin og Pál Weihe nú frá at eta grind og spik.
*http://www.kb.fo*

### Húsið
**Fríggjadagin 27. feb. 2009 kl. 13.00 - 22.00**
**Torradagur í Húsinum – Húsið fyllir 3 ár**

Kl. 13.00 – 17.00 Opið hús
– nógv spennandi á skránni
TNT og Rógvi Jacobsen Band framføra
Kl. 17.30 – 22.00 verður grýludiskotek fyri børnum 3. – 7. flokki.
Vinningur latin til vakrastu grýlu.
**http://www.husid.fo**

### Fiskimið í Norðoyggjum.
**Norðoya Fornminnasavn**
**fríggjadagin 27. feb. kl. 17.00 - 19.00**

Sýnir fram partar av søguligum tilfari um fiskimið í Norðoyggjum.
Hvat er savnað og útgivið, og eisini verða útróðrarleiðirnar vístar á korti.
Framsýningin er opin frá týsdegnum 24. til fríggjadagin 27. februar kl. 17.00 - 19.00

### Svimjihøllin
**Fríggjadagin 27. feb. 2009 kl. 19.00**
Kajak-vending
Annars er svimjihøllin opin: kl. 15.00 - 20.00

### Torra-svimjing
**Svimjihøllin**
**Leygardagin 28. feb. 2009 kl. 10.00 – 17.00**
Heitari vatn, kaffi, køkur, undirhald við tónleiki og spølum.
Tað altíð spennandi vatnlandið við 44 m langari øku er opið.
Hita- og heilsuklivar eru eisini opnir.
Ein stórur og annarleiðis dagur fyri alla familjuna
*http://www.svim.fo*

### Matiné
**Christianskirkjan**
**Leygardagin 28. feb. 2009 kl. 11.00**

Helga Hilmarsdóttir Gerðalíð orgul og Monika Stauss Joensen violin
Á skránni verður Haendel sonata, Meditation av Massenet, Fantasie av Telemann og fleiri.



### Torra-Heilsurenning
**- Klaksvík - ein Heilsubýur**
**Klaksvíksvegur**
**– niðanfyri Klaksvíkar Sjúkrahús**
**Leygardagin 28. feb. 2009 kl. 13.00**

Gunvá við Keldu, borgarstjóri setur renniningina í gongd
Teinurin er 4,1 km. Talan er um heilsurenning, og tí er ikki neyðugt við tilmelding.
Øll eru hjartaliga vælkomin at luttaka, tvs. renna og/ella ganga. Rutan gongur úteftir Klakvíksvegnum, Stoksoyravegnum, síðani heim eftir Torvgøtu niðan til Víkavegin, eftir Víkavegnum, Vágsheygsgøtu til Fosságøtu, har snarað verður oman til Uppsalagøtu, síðani oman í Vágstún og so út eftir Klaksvíksvegnum út til Sjúkrahúsið, har málið er.
Vegirnir verða ikki avsperraðir, og tí verður heitt á luttakararnar um at vísa stórt varsemi, meðan runnið/gingið verður.
Gott hevði verið, um luttakararnir vóru í gulum vesti.
*http://www.treysti.fo*





## Alla hesa vikuna frá 23. Til 28. Februar verða árliga tiltakið "Torradagar" hildið í Klaksvík, har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum

TORRADAGAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Í hesu viku leggja klaksvíkingar enn einaferð til brots og seta dagskránna á sín sermerkta og fólksliga hátt. Hesaferð verður tiltakið "Torradagar" hildið í Klaksvík alla vikuna við hópin av spennandi og áhugaverdum tiltøkum frá morgni til kvølds.

Torri stavar frá tí gomlu tíðarrokningini, har hetta var navnið á mánaði, sum byrjaði fyrstu tendring eftir jól og vardi fram til næstu tendring.

Mánaðirnir vórðu kallaðir jóla, torri, góa o.s.fr. Torri verður sett í samband við tvørra, við merkingini "minka". Her verður hugsað um, at mánin er í minking (hvørvandi sól), ella at veturin er farin at halla ella minka. Tá ið tað hevur verið sett í samband við turrur, hevur m.a. verið hugsað um veðrið ta tíðina á árinum.

### Gongur fram móti ljósari tíðum!

Útróðrarmenninir tosa um torrafisk í hesum døgum – tí fiskurin kemur longur inn á grunnin at gýta. Hesa tíðina er fiskurin væl fyri og hevur rogn. Í torratíðini varð etin annarleiðis tilgjørdur fiskur, sum varð fyltur á serligan hátt m.a. við rogni og livur.

Tá ið Klaksvík er fiskivinnuhøvuðsstaður Føroya og annars er nógv knýttur at fiskivinnuni – samstundis sum torratíðin á landi er friðarlig og tom eftir stóru jólahalguna, varð hildið, at tað hevði verið áhugavert at gjørt nakað serligt burturúr hesum tíðarskeiði, so sum tað varð gjørt fyrr og so, sum teir enn gera nógv burturúr í Íslandi.

Ætlanin er at nýta vikuna 23. – 28. februar 2009, har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum í Klaksvík. Fyrilestrar um torra, torrafisk og torrahald. Um fiskivinnu og siðir á sjónum. Eisini er ætlanin at skipa fyri fyrilestrum um fiskivinnuna í dag og fáa serfrøðingar frá Fiskiransóknarstovuni at greiða frá fiskivinnuni, sæð frá teirra eygum.